## DAGSINS MEINING

# Valstríðið byrjað av álvara

Kjaksendingin í SvF hóskvøldið varð eitt av startskotið valstríðið. Hetta er ein sending, sum vit gott kundu sæð meira til í sjónvarpinum, tí kjak um samfelagsspurningar o.a. er altíð gott fjølmiðlatilfar, um verturin dugur at fáa mótpartar at leggja fram síni sjónarmið, uttan at hetta skal enda við runublaking og øði. Og hevur tað eisini týdning, at slík kjaksending fær ta tíð, sum er neyðug. Oftani er verður so stutt tíð sett av til týðandi politiskt kjak, at tey enda í hálvum gekki. Hetta var so eitt undantak, har verturin við ikki at blanda seg og við at blanda seg til rætta tíð, fekk báðar luttakararnar at føra fram síni sjónarmið uppá gott og ilt. Men fortreytin fyri at hetta kann rigga hvørja ferð er, at politikarar duga sær hógv, duga at lurta og duga at siga tingini stutt og kontant – og at verturin veit, nær hann skal seta rætta spurningin, nær hann skal leggja seg út í kjakið og ikki minst, veit nær hann skal lata vera. Vit síggja tí fram til nógvar áhugaverdar kjaksendingar í SvF fram til valið.

Men hvat kom so burtur úr! Tað er ein heilt annar spurningur. Tað vilvera upp til fólk at meta um, og uttan iva eru nógvar meiningar um tað. Síggja vit burtur frá innihaldinum, so "vann" Óli Breckmann henda valdystin. Hann var greiður og klárur við sínum útmeldingum, samd ella ósamd í innihaldinum, meðan Høgni Hoydal meira minti um taparan, um politikaran, sum hevði givið skarvin yvir uppá forhond. Hóast hann á sín siðiliga og miðvísa hátt royndi at fáa mótpartin og hyggjararnar til at skilja seg og tað hann stóð fyri, var her tó í stóran mun talan um endurtøkur, um eina plátu, sum vit hava hoyrt fyrr.

Tað sama kann eisini sigast um Óla Breckmann, sum her enn einaferð roynir at varta upp við sínum vanligum svadum um sosialistar ol. Nú er tað góður musikkur at seta tjóðveldismenn í nærum sovjetsosialistiskan bás. Fyrr var adressan annars javnaðarfólk. Óli Breckmann roynir eisini á sín ósakliga hátt at taka sær alla æruna av tí politikki, sum samgongan hevur staðið fyri.

Høgni Hoydal ger tað mistak, at hann roynir at fara uttan um tann veruleika, at samgongan hevur havt trupulleikar og hevur ikki megnað at standa saman sum ein maður. Hann koyrir aftur og aftur somu plátuna um, at tað er nærum rokkið á mál við fullveldinum osfr. Munnu veljararnir halda tað!

Eftir stendur, at báðir hesir samgongumenn, í veruleikanum eru ringastu fíggindar í mongum politiskum málum, og tí er niðurstøðan heilt greið: at tað verður eingin samgonga millum hesar báðar flokkarnar eftir næsta val, við ella uttan ávís fullveldisvalevni hjá fólkaflokkinum í høvuðsstaðnum. Tað varð greiði boðskapurin í hesi sending. So veit veljarin tað. Men síggja vit burtur frá innihaldinum, so átti Óli Breckmann sendingina. Um tað so er nóg mikið til at mobilisera sínar gomlu veljarar er óvist. Hóast plátan hjá OB koyrir í somu rillu,skerst ikki burtur, at hon hoyrist. Høgni Hoydal fekk neyvan nakrar nýggjar atkvøður við hasi sendingini. Til tess má hann til at venda plátuni – leggja okkurt nýtt lag á – skal hann framhaldandi vera á toppinum í føroyskum politikki.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útbúna fólkið sleppur ikki heim

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*

Bústaðartrupulleikin er nú so stórur í Føroyum, at tann vitan vit hava tørv á, ikki sleppur heim – tí onki er at búgva í.

At bústaðartrupulleikin nú er so stórur, at vit ikki fáa útbúna fólkið til landið, er onki minni enn ein katastrofa.

Tað er ófatiligt, at eyguni ikki eru sett á trupulleikan, tí vit hava stóran tørv á vitan, nú vit skulu inn í oljuvinnu og aðrar vinnur, og annars er tað heilt natúrligt, at eitt samfelag ger karmar fyri teimum fólkum, sum so hjartans fegin vilja heim á oyggjarnar aftur.

Sum eg havi nevnt, er neyðugt at hugsa stórt, og er tað tí avgjørt í tøkum tíma, at taka henda samfelagstrupulleikan upp, og gera nakað munagott.

**Húsalánsgrunnurin**
Sámal Petur í Grund gjørdi stórt hóvásták burturúr tí, at Húsalánsgrunnurin ikki skal hava neyðugu heimild til sítt virksemi, men so er bara eitt at gera, og tað er at fáa hetta loyst – tað loysir ongan trupulleika at kasta eftir grunninum, hvat hann ikki kann – betri er at loysa tann veruliga trupulleikan, sum er at fáa íbúðir til unga – og eldra fólkið.

**Fígging**
Vit hava hoyrt, at leiðslan innan tryggingarfeløgini - kanska serliga Føroya Lívstrygging, sær ein møguleika fyri góðum avkasti, við at felagið fer inn í byggiprojektir, hann nevndi skrivstovubygging, men sær hann eina góða forrætning við at fara inn í íbúðarbygging, skal tað undra meg, um hetta ikki er ein fíggingarmøguleiki.

Heldur ikki ivist eg í, at banki og sparikassar eru positivir, tí væl veit eg, at hetta er peningakrevjandi bygging, men tá talan er um eftirspurning og útboð, kann tað ikki sigast annað enn, at eftirspurningurin er nógv størri enn útboðið.

**Myndugleikarnir**
Tað er ongin ivi í mínari verð, at tað er vilji til at loysa henda spurningin, bæði inn byggivinnuna, fíggjarstovnar og hjá tí almenna, men tað er politiski myndugleikin, sum skulu stinga ein politikk út í kortið, og at gera tær lógarbroytingar og annað sum skal til, soleiðis at gongd kemur á henda – eftirhondini – stóra samfelagstrupulleikan.

# Økismenningin heldur fram!

**Svenning Borg**
*Vágur*

Tað seinasta í økismenningini hjá sitandi samgongu er, at allir føroyingar, sum skulu taka koyrikortið, skulu til Havnar fyri at fáa tað.

Hetta samsvarar væl við tað, sum er farið fram í økismenning hjá sitandi samgongu, tað er tað sama økið, sum skal mennast, meðan hini økini nærum skulu avtoftast.

Hvussu nógv skulu okur í útjaðaranum lata okkum lynda? Nei, nú má vera nokk.

Suðuroyingar skulu sjálvandi kunna taka sítt koyrikort í Suðuroynni, tað krevja okur.

# Umbering

Eftir áheitan frá Jóannes Vitalis Hansen, formanni í Unga Tjóðveldinum skal blaðið koma við eini umbering fyri tað mistak, sum varð gjørt í Sosialinum hósdagin 28. februar. Tá varð í lýsing frá Restorffs brúkt mynd av Jóannes Vitalis Hansen og øðrum persóni umboðani annað politiskt ungmannafelag. Myndin varð tikin av myndamanni blaðsins til eina tíðindagrein í sambandi við eina plakat fyri ungdómstiltakið Nýtt Hugfar. Síðani er partur av umrøddu mynd brúkt aftur í eini lýsing.

Nú er mannagongdin í sambandi við lýsingar oftast tann, at blaðið ger lýsing eftir áheitan og ynski frá lýsara. Og tað varð eisini gjørt í hesum førinum. Vit vóru í tí góðu trúgv, at lýsarin sjálvur hevði neyðugu loyvini at brúka umrøddu mynd í lýsingini.

Tá hann kortini ikki hevði tað er greitt, at rætt er ikki farið fram og vil blaðið, sum hevur gjørt lýsingina og prentað hana, bera persónunum, ið eru á myndini eina treytaleysa umbering. Tað stendur greitt, at umrøddu persónar ikki hava givið loyvi til at lata seg avmynda til eina handilslýsing og tíansheldur einki eiga í tí teksti, sum stendur í lýsingini. Tí skal her verða váttað, at hvørki Jóannes Vitalis ella Unga Tjóðveldið ella annar persónur/felag hava nakað samband við umrøddu lýsing.

***Vinarliga***
***Blaðstjórin***


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Nakna kvinnan - og neyðin

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Ein partur av sera ivasama grundarstøði loysingarmanna er eitt orðatak: "Neyð lærir nakna kvinnu at spinna". Kann hetta orðatak nýtast til at eksperimenta við eini heilari tjóð, sum loysingarfólk gera ídag, kunnu vit spyrja.

Teirra hugsan er hendan einfalda, at um loysing verður framd, so verður neyð í Føroyum. So langt kann ein vera fullkomuliga samdur. Men koma altíð klæðir á kroppin, tá ein hevur kasta tey burtur?

**Nakna kvinnan:**
Set eina nakna kvinnu í eitt 4 mannafar. Sigl hana út á 20 fjórðingar ídag og lat hana klára seg sjálva.

Er ikki størri møguleiki fyri, at ein illa fyrikomin persónur verður funnin rekandi í 4 mannafarinum enn ein vælklødd kvinna við bátinum fullum av fiski? Veruleikin er fyrsti møguleikin, nationalromantisma loysingarmanna er tann næsti.

Vit kunnu hyggja eftir mongum fullveldi í heiminum ídag, og síggja, at í fleiri teirra stendur sera illa til. Ongin skúli, arbeiðsloysi, korruptión, ein sera ríkur ivirklassi og mong sera fátæk. Neyðin hevur sent fátæku kvinnuna og børn hennara út í eina óvirðiliga prostitutión fyri at fá klæðir á kroppin. Serliga har illa hevur verið stýrt. Og tað verður sera, sera illa stýrt í Føroyum ídag. Løgmaður hevur ongantíð stýrt. Sjálvt evarska lítla málið um skúlan á Trøllanesi hava teir ikki loyst. Tað er lítið skil í nøkrum, loysingarsamgongan fæst við. Ríkisveitingin verður skerd uttan at nøkur tillaging hevur verið gjørd áðrenn. Tvørturímóti er peningur oystur út í almenna fyrisiting sum ongantíð fyrr í Føroya søgu - og síðan verður veitingin skerd. Tað átti at verið øvugt. Eftir at hava skert um møguleikar fyri at gera Norðoyatunnilin - fara Karstin Hansen, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin í panik og krevja, at ein hálv ætlan skal samtykkjast í løgtinginum. Hví lata Karstin Hansen og aðrir norðoyatingmenn og kvinnur ikki norðoyingar síggja langtíðaríløguætlanina, nú teir í ábyrgdarloysi hava skorið eina upphædd, ið svarar til ein Norðoyatunnil burtur - hvørt ár.

Sambandsflokkurin ynskir at ríkisrættarligar broytingar vera framdar, ið fólkið tekur undir við. Og hesar broytingar skulu gera tað tryggari at liva í Føroyum.

# Føroyingar á altjóða svartalista

**Ólavur Petersen**



Er orsøkin til, at tað hevur gingið sum fótur í hosu at yvirtaka skipaeftirlitið tann, at danska stjórnin ikki longur vil leggja navn til føroyska handils- og sjóvinnuflotan.

Stólurin undir reyvuni á stjóranum á nýyvirtikna skipaeftirlitinum var nóg illa lunkaður, tá hann varð varður við óskilið í føroyska handilsflotanum.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í sjóvinnumálum, er beinanvegin klárur við loysnini. Loysnin er, at serføroyska skipaeftirlitið skal ferðast knøttin runt 365 dagar um árið, at halda eyga við at føroyskir sjóvinnumenn og føroysk reiðarí halda altjóða sjóferðslulógir.

Hví blása hetta málið upp? Er hetta málið annað enn ein nýggjur gluggi at skoða óskili ígjøgnum, sum valdar her í landinum.

Á sjónum, so væl sum á landi, eru nógv dømir.

Í landsstýrinum sita í minsta lagið tveir, sum ikki áttu at verið valbærir til løgtingið og hvaðna verri verið landsstýrismenn.

Jørgen Niclasen er í hesum døgum í valstríði við valevni á sambandslistanum í Vágum, sum neyvan eigur at ganga leysur.

Eftir at hava verið í læru í nakrar krákumánaðar hjá Anfinni Kalsberg, so dugdi Jørgen ikki á at skyna, hvat er mítt, og hvat er títt.

Jørgen! Mátin at venda gongdini í føroyska handilsskipaflotanum er ikki at seta fleiri skipasýnismenn, men lógarsmíð sum tilskilar skyldur og ábyrgd fyri mannalívi og skipið – og ikki minst álvaran í teim avleiðingum, sum verða virknar, um lógin verður brotin. Læt "altjóða skipaeftirlitið" bera kostnaðin uttanfyri okkara øki, men læt umsitingarvaldið og dómsvaldið í Føroyum gera fyribyrgjandi arbeiði, sum eftir greiðum lógum plaserar ábyrgd.

Tað skal bara eitt ættarlið til at fáa rot í eitt heilt samfelag.

Eftir aldrinum kundi løgmaður verið pápi landsstýrismannin í sjóvinnumálum. So kanska er Jørgen Niclasen umskyltur.

# Almennur ineffektivitetur tá hann er í hæddini

**Niklái Petersen**
*langfarasjómaður, Todnes Kollafjørður*

Tá føroysku langfaraskipini í 1993 fóru yvir á Flemish Kapp at fiska varð nógv tosað um vána hoyrilíkindir har vesturi. Menn vóru keddir av ikki at hoyra útvarpið og heitt varð á landsins myndugleikar um at bera so í bandi, at møguleiki bleiv at hoyra útvarpið.

Kanningar vórðu gjørdar og niðurstøðan varð, at 1 til 2 ársverk skuldu setast (170.000 til 300.000 kr.) so kundi man leiga seg inn á onkra stuttbylgjustøð hjá grannalondunum (Noreg, Íslandi ella Danmark) og fingið senditíð har fyri ein sámuligan pening. Tað er jú avmarka hvussu langt millumbylgjan hoyrist, og eisini var óvissa um hvussu leingi fiskiskapurin kom at halda fram.

Hettar var altso ein akuttur tørvur, ið skuldi loysast skjótt, var hildið, men vit fingu annað at síggja.

Hettar er tað stutta av tí langa.

Hettar mál hevur nú á níggjunda árið sløðst, sum bukka millum sengur, men enn er onki hent uttan tos og tos og aftur tos, harrin náði tú meg.

Hettar er virðingin sum landsins myndugleikar vísa einum parti av fiskivinnuni, her er eingin flokkur undantikin. Lágt liggja tit, tví skammið tykkum!!!

Nú stundir til val, og nú skulu helst fleiri gera sær dalt av hesum, onki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt, eg meini tað.

Elis hevur tíbetur hildið lív í hesum og tikið hettar upp í sínum sendingum á Frívaktini av og á, stóra tøkk fyri tað Elis.

# Norðoyatunnilin

**Steinbjørn O. Jacobsen**
*borgarstjóri*



Tað var nær við, at arbeiðið og drúgva bíðitíðin eftir undirsjóvartunnlinum varð skotin uppaftur longur inn í framtíðina.

Tað var ógvuliga hugstoytt í fyrradagin at frætta, at landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, av tingsins røðarapalli, upp á fyrispurning frá Heina O. Heinesen løgtingstingmanni, hevði svarað, at eingin annleggslóg verður løgd fram í hesum valskeiðnum.

Fyri býráðið, sum tá hetta frættist, júst sat á fundi við P/f Norðoyatunnilin, komu hesi tíðindi ógvuliga dátt við.

Tað kundi og kann als ikki góðtakast, at hetta stórmál, sum longu nógv orka og peningur er lagdur í, verður steðgað politiskt og skotið út í framtíðina.

Øll vita, at tað bara økir um kostnaðin at draga eina bygging út – og tá tað í hesum føri er talan um eina sera kostnaðarmikla verkætlan, kunnu vit skjótt tosa um heilt stórar upphæddir, sum við eini útseting verða lagdar oman á verandi kostnað.

– Her ræður um at bera skjótt at, fyri at halda kostnaðin niðri!

Fyri okkum í Norðoyggjum er sambandið úteftir eitt ómetaliga týðandi mál, ið verður altavgerandi fyri framtíðina hjá Norðoyggjum sum undangonguøki, bæði mentanarliga, trivnaðarliga og ikki minst vinnuliga, har okkara fólk so mangan hava gingið undan og slóðað fyri øðrum.

Kappingarførið hjá vinnulívinum er í síðsta enda fortreytin fyri øllum øðrum virksemi í samfelag okkara.

Landsmyndugleikarnir mugu leggja sær í geyma, at allar fyritøkur arbeið aog leggja ætlanir úfrá teimum politisku fráboðanum, sum koma. Tað er tí sera óheppi og til skaða fyri álítið og trúnna á framtíðna í øki okkara, at landið í hesum so týðandi máli fyrst boðar frá og arbeiðir út frá eini tíðarætlan, fyri síðani brádliga at seta málið út í eina óvissu, sum eingin kennir avleiðingarnar av.

Mangir norðingar mundu kenna seg sleptar upp á fjall, tá okkara landsstýrisumboð – í síðstu løtu av hesum valskeiði – eftir øllum at døma lótu sær lynda, at málið varð útsett.

Grundgevingin fyri hesi brádligu útseting sigst vera, at vegagerðirnar til og frá fasta sambandinum ikki eru komnar upp á pláss.

Sjálvsagt hava so grundleggjandi broytingar í ferðslumynstrinum avleiðingar fyri veganetið, sum má tillagast nýggja tørvinum, men her ruggar kortini ikki heilt rætt, tí sum flestøll vita fer tunnilsarbeiðið – um hildið verður fram eftir løgdu ætlanini – frá nú av at taka eini 3-4 ár.

Í hesum tíðarskeiði er væl gjørligt hjá kommunum og landi í felag at finna greiðu á tí partinum – ein útseting er tí ikki neyðug av hesi orsøk, men sjálvsagt skal ein vilji til.

Henda grundgeving bar tí brá av eini undanførslu.

Almennar kostnað/nyttu kanningar vísa, at júst hendan íløgan er ein tann samfelagsliga besta, og tað undrar tí almikið, at júst hendan íløgan mundi verðið ofrað, meðan ein eykajáttan fyri og onnur eftir, uttan kostnað/nyttu kanningar, verður samtykt á Føroya Løgtingi. – Her hongur ikki saman.

Klaksvíkingar og norðingar hava tolnir bíðað eftir hesum tunnli og hava latið aðrar íløgutørvir bíðað – júst við tí fyri eyga, at einki slíkt skuldi forða hesum so avgerandi framstigi, sum undirsjóvartunnilin er, bæði fyri Norðoyggjar men so sanniliga eisini fyri landið alt.

Tað er tí hugstoytt, at júst ein slík grundgeving varð brúkt sum grundgeving fyri at seta fasta sambandið um Leirvíksfjørð út í óvissu.

Eisini hevur kommunan í longri tíð – ímóti sínum vilja og til ampa fyri vinnufyritøkur í býnum – kent seg noydda at bíða við avgreiðslum av byggilendi til vinnuna á einasta staði í kommununi, sum í løtuni er byggibúgvi til vinnuligt endamál, tí at vegaføringin til tunnilin liggur dyst við hetta økið.

Við tí átrokandi eftirspurningi, sum er frá vinnufyritøkum um hetta økið, er mark fyri, hvussu leingi kommunan kann bíða við at svara hesum.

Tað kendist tí sum ein lætti, tá tað í gjár frættist, at landsstýrið kortini – í síðstu løtu – bar málið niðan í Tingið, har málið um heimild til stovnan av partafelag fyri stuttum fekk fulla undirtøku. Hetta var í sambandi við uppskot til løgtingslóg um stovnan av partafelag at gera fast samband um Leirvíksfjørð, ið varð samtykt av øllum 30 tinglimum, sum luttóku í atkvøðugreiðsluni.

Vón okkara norðinga skal vera, at tað eisini hesa ferð, nú anleggslógin kemur fyr, fær dygga undirtøku á Føroya Løgtingi – til frama fyir landið alt.